ORKUTAK

# GOTT FYRI UMHVØRVIÐ, UMDØMIÐ OG LANDSKASSAN

Skiftið til varandi orkukeldur í almennum bygningum er ikki ein útreiðsla. Tað er ein íløga. Les um eitt av okkara orkutøkum á baksíðuni.






> Vit eru errin av at starvast á einum stovni, ið nýtir orku burðardygt. Við nýggju vindeygunum er ljósari inni og inniluftin er munandi betri. Hetta er kveikjandi og gott fyri trivnaðin hjá bæði starvsfólki og teimum lánarum, sum hava brúk fyri einum staði at arbeiða í. Eisini hava vit fingið íblástur til onnur grøn tiltøk á Landsbókasavninum.
>
> **Annika Smith** Leiðari á Landsbókasavninum

**ORKUTAK**

# LANDSBÓKASAVNIÐ

Á Landsbókasavninum bleiv í sept. 2017 lagt um frá olju til hitapumpur. Nýggj stýring ger tað lætt at fylgja við hitaskipanini og optimera orkunýtsluna. Eisini blivu gomul ótøtt vindeygu skift út við orkuvindeygu.

## FYRIMUNIR

- // Grøn loysn livir fult upp til umhvørvismál. Minni orkunýtsla og CO2 útlát minka umleið 70%.
- // Betri inniluft og hiti, og gjósturin er burtur.
- // Meira ljós kemur inn gjøgnum nýggju vindeyguni.
- // Einki vatn at turka við vindeyguni.
- // Óávirkað av sveiggjum í oljuprísi.
- // Munandi sparing í orkurokning.
- // Sparing í viðlíkahaldi, t.d. er stóri skorsteinurin nú burtur.

## ÍLØGA

| Hitaskipan | Vindeygu | Mett forrenting | Mett virðisøking |
|---|---|---|---|
| **0,5** mió. | **0,6** mió. | **4%** jan.´18 | **1–2** mió. |

## LANDSBÓKASAVNIÐ UPPHITING

| | | Áðrenn | Aftaná |
|---|---|---|---|
| **Orkunýtsla** | kWt/ár/m² | 116 | **71** |
| **Olja** | ltr./ár | 19.800 | **0** |
| **El** | kWt/ár | 0 | **48.400** |
| **Kostnaður** | kr./ár | 111.000 | **67.000** |
| **$CO_2$ útlát** | kg/ár | 52.500 | **15.500** |

## ORKA TIL UPPHITING 2017

kWt/mðr.




LANDSVERK